# Porsche-urið



Tú hevur kanska ikki ráð at keypa tær bilin frá teimum, men kanska tað ber til at skava so frætt av leysum saman, at tað ber til at keypa eitt av teirra urum. Porsche selir ur, sum ger tað til eina fragd at svara fólki, tá ið tey spyrja, hvat klokkan er. Eitt av teimum stóru og sterku urunum frá Porsche er nýggja Worldtimer, sum kann verða hent í hesum globaliseraðu tíðum. Urið, ið er framleitt av Eterna, kann lætt og snilt halda skil á tveimum tíðarsonum samstundis – og so sær tað eisini út sum eitt ordiligt ur. Vegleiðandi prísur: 75.500 – www.porscheshop.co.uk



# Kvøldmáltíðin hjá Torbjørn

Torbjørn Olsen hevur í hesum døgum framsýning í Galarí Focus í Havn. Listamaðurin við teimum framúr strokunum hevur millum annað gjørt sína mynd av seinastu kvøldmáltíðini, sum Leonardo Da Vinci hevur gjørt kendastu myndina av. Hesin oljumálningurin kann síggjast í Galarí Focus fram til 22. februar, men tú ert ov seinur, um tú vildi havt myndina í stovuna hjá tær eftir tað – hon er seld. Prísur: 22.000 krónur – www.galeriefocus.com



# Kulur kuldi

Hvat kann verða betri enn eitt megastórt køli- og fyrstiskáp, sum enntá kann syrgja fyri svalandi ísterningum. Hetta Samsung-køliskápið er viðgjørt við Nano silvur-ionum, sum skulu mótvirka bakterium. Harvið skulu matvørur halda sær betur í hesum skápinum. Vegleiðandi prísur: 10.000 krónur – www.samsung.dk



# Amboðskassin í lummanum



Legg sveisaraknívin til viks og verð ein rættur maður við einum ordan multi-amboði í lummanum. Leatherman er ein av fyritøkunum, sum framleiðir sterk og kompakt multi-amboð. Surge-útgávan av Leatherman skal verða serliga góð – ein stóribeiggi til áðurkendu Wave-útgávuna. Hetta amboðið kann klára tær flestu av teimum fyrifallandi uppgávuna – og so verður eisini hugsað um trygdina, so tú ikki kemur illa fyri at hava øll hesi amboðini í lummanum. Vegleiðandi prísur: 1200 krónur www.leatherman.dk

# 50 tummar á veggin

Í hesum tíðum ganga flatskíggjar sum heitt breyð. Fløt sjónvarp verða tveitt um handilsdiskarnar, og fólk taka gleðiliga hesa nýggju opinbering heim í stovuna. Góðskan á flatskíggjunum er tó sera ymisk, og ofta ber til at lesa hetta av á prísinum. Eitt av teimum frægu sjónvarpinum er PDP-508X hjá Pioneer, sum er eitt plasma-sjónvarp. Sjálvt garvaði serfrøðingar hava hug at nikka, tá ið tann skarpa og detaljeraða myndin kemur á skíggjan. Ofta er endurgevingin av svørtum ein trupulleiki, men í hesum sjónvarpinum er tað ein sera lítil trupulleiki. Sjónvarpið er flott og einfalt – og so er tað upplagt at hanga tað á veggin sum var tað eitt annað listarverk. Vegleiðandi prísur: 27.000 kr. - www.pioneer.dk